


Við 107 ymsum handlum ber væl til at nýta heilar dagar, um shopping-túrurin í Reykjavík gongur til Kringluna

# Framvegis **fremstir** í móta

**Búskapurin er ikki eins sterkur, sum hann hevur verið. Men íslendingar ganga framvegis í oddinum, tá um móta ræður**





**ÍSLAND**
**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo

Næst eftir París og London hevur Reykjavík í drúgt áramál verið roknaður sum fremsti mótabýurin í Europa.

Í dag hevur búskaparkreppan hevur sent íslendsku keypiorkuna niður í helvt, og tí er fólkastreymurin á gongugøtuni ella við stóru keypsmiðstøðirnar ikki tann sami, sum hann hevur verið. Men skuldi nakar verið í iva, so er úrvalið framvegis bæði breitt og gott.

Fyrst og fremst er tað nevnliga kend útlendsk merki og íslendskar designaravørur, sum prýða handilsgluggarnar.

Hvat teimum útlendsku viðvíkur, so er ikki tann heilt stóri peningurin at spara - sammett við føroyska prísleguna. So tó at mvg-afturbering og umhugsni við kursinum kann spara nakað, so er úrvalið og mótin væl tað, sum er berandi elementið í hesum.

Hinvegin kunnu mongu íslendsku design-vørurnar í dag keypast fyri ein sera rímiligan pening. Fittur partur av kostnaðinum fyri hesar er jú arbeiðsløn, og tá hendan stendur í stað, hóast ógvusligu kurslækkingina, hevur hetta sera lokkandi prísir við sær. Bæði innan klædnavørur og prýðislutir, sum eru tvey øki, har fleiri íslendskir sniðgevar hava gjørt rættiliga nógv vart við seg seinnu árini.

Tá keypast skal inn, eru tað fyrst og fremst trý mið, sum draga.

Laugavegurin er stóra handilsgøtan í Reykjavík. Er veðrið til vildar, er talan um framúr hugnaligar umstøður til tey keypandi. Og skulu beinini hvílast eru eisini nógv høvi til hetta. Bæði á sjálvum Laugarvegnum, men ikki minst á mongu café'unum, sum liggja á síðugøtum til høvuðsgøtuna. Og so ikki at gloyma hugnaliga matstovuumhvørvið oman móti havnarlagnum, har handilsgøtan endar.

Og so eru tað eisini tær báðar stóru handilsmiðstøðirnar í býnum.

Kringlan, sum varð bygd í 1989, var í fleiri ár stóri stoltleikin hjá handilsfólkinum í býnum. Við

**Smáralind í Kópavági er í dag størsta keypsmiðstøðin í Íslandi. Og tó at hon liggur nakað frá sjálvum miðbýnum, er bæði skjótt og ómaksleyst at leita sær til Kópavág**

tilsamans 107 handlum – matstovurnar íroknaðar – er talan eisini um keypsmiðstøð, sum rúmar tí mesta. Og við plaseringini nær miðbýnum ber væl til at spáka sær úr býnum og til miðstøðina.

Hin stóra handilsmiðstøðin er Smáralind í Kópavági. Tó at Kópavágur er mest sum fastbygdur í Reykjavík, so er talan um dekan ov langan gongutúr hjá teimum flestu, men til ber at koyra við bæði taxa og bussum, og heldur ikki er nakar trupulleiki at finna fram í leigubili. Ikki minst tí velduga Føroya-tornið hjá Jákupi á Dul Jacobsen stendur beint undir liðini á Smáralind.

Í vavi er Smáralind upp aftur meira rúgvusmikil enn Kringlan, og hartil eru bæði ein risastórur leikuhandil og størsta deildin hjá Rúmfatalagurinn (Jysk sengetøj) eisini mest sum fastbygd í stóru miðstøðina.